

# Lærarar til Skúlan við Løgmannabreyt

Hevur tú hug at verða partur av sjálvstýrandi toymum? Kundi tú hugsað tær at gjørt flest allar uppgávur, ið eru tengdar at lærarastarvinum, í skúlanum? Vilt tú brúka minst helvtina av egintíðini í skúlanum? Um tú kundi hugsað tær hetta, send so umsókn um lærarastarv.

Skúlin við Løgmannabreyt søkir eftir 7 lærarum at byrja skúlaárið 2008/09.

- 6 lærarar í fast starv
- 1 lærara til avlopstímar. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. september

## Førleikakrøv

Tú skalt hava útbúgving sum fólkaskúlalærari.

Tað kann vera ein fyrimunur, at tú dugir væl at brúka teldu sum amboð í undirvísingini og talgildar undirvísingarmiðlar.

## Skúlin bjóðar

- Nýggjan skúla, sum verður tikin í nýtslu í stigum
- Starv við møguleika at bróta upp úr nýggjum
- Nútímans skúla við m.ø. samvirknum skúlatalvum
- Góðar arbeiðsumstøður
- Fyrireikingarhøli við egnum skriviborði og egnari farteldu
- 2 ára royndarvirksemi við sjálvstýrandi toymum

## Lønar- og setanartreytir

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmálanum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Størvini eru lønt í lønarflokkunum 18.1 til 29.2.

Størvini eru sáttmálasett, uttan so er, at tey, ið sett verða, eru tænastumannasett frammanundan.

## Umsókn

Umsókn við avriti av læraraprógvi og øðrum prógvum, møguliga viðmælum og upplýsingum um starvsroyndir skal vera í Skúlanum við Løgmannabreyt í seinasta lagi fríggjadagin 11. juli 2008.

## Meiri fæst at vita

um størvini frá Høgna Joensen, skúlastjóra, á tlf. 21 41 09.

## Umsókn verður stílað til

Skúlan við Løgmannabreyt
Postrúm 66
110 Tórshavn

## Ella umvegis teldupost

hogni.joensen@skulin.fo

**Skúlin við Løgmannabreyt verður 2-sporaður skúli frá 1.-9. flokk. • Hann verður tikin í nýtslu í stigum. Fyrsta byggistig verður liðugt í august í ár. Tá fara umleið 115 næmingar í 1., 2. og 3. flokk og í frítíðarskúlan. • Allur skúlin verður liðugur í august 2009.**